## USA eftir sjórænarum



Amerikanski uttanríkisráðharrin, Hillary Clinton, sigur nú, at USA er til reiðar at standa fyri bardaganum ímóti sjórænarunum, sum herja leiðirnar úti fyri eysturafrikonsku strondini. Hon sigur eisini, at USA fer at kanna, um tað ber til at finna pengarnar hjá sjórænarunum og at leggja hald á teir. Í danska reiðarafelagnum eru tey fegin um amerikanska tilboðið. Jan Fritz Hansen, varastjóri í reiðarafelagnum, sigur við DR, at tað hevur stóran týdning, at USA fer upp í stríðið ímóti sjórænarunum. Hann vísir á, at amerikanararnir hava fylgisveinar og aðra tøkni, sum kann vera hent í stríðnum ímóti sjórænarunum.

## Byggireglur ikki hildnar

Serfrøðingar í byggiviðurskiftum hava staðfest, at nógvir bygningar, sum rapaðu ella fingu stóran skaða í jarðskjálvtanum í Italia tann 6. apríl, vóru ikki bygdir sambært galdandi byggireglum. Millum annað rapaði eitt sjúkrahús, sum ikki var bygt sambært reglunum. Millum feløgini, sum stóðu fyri byggingini, var eitt italskt byggifelag, sum eitur Impregilo, og sum er landsins størsta á sínum øki. San Salvatore-sjúkrahúsið er bara níggju ára gamalt og skuldi eftir ætlanini halda til munandi harðari jarðskjálvta enn tann, sum fyri 6. apríl.

# Fakfeløg tosa um Anfinn Kallsberg

**Fakfeløg fara nú at tosa saman um útsøgnina hjá formanninum í fíggjarnevndini um at steðga øllum lønarhækkingum**

LØNARSTEÐGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum fara nú at tosa saman um útsøgnina hjá Anfinni Kallsberg, formanni í fíggjarnevndini, í Sosialinum í gjár um, at eftir hansara tykki er tað einasta rætta at steðga øllum lønarhækkingum tey næstu árini, bæði á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum fyri at fáa búskapin aftur



*Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Pedagogfelagnum heldur, at Anfinn Kallsberg brýtur spælireglarnar og tað fara fakfeløg at tosa við Jóannes Eidesgaard um*

Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Pedagogfelagnum ivast ikki í, at hetta er eitt mál, sum fakfeløgini fara at taka upp, tí eftir sum, at talan er um sjálvan formannin í fíggjarnevndini, er neyðugt at taka tey í álvara.

Sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum ganga út 1. oktober næsta ár, men 1. oktober í ár skulu lønirnar hækka trý prosent.

Hann sigur, at á hesum fundinum væntar hann, at fakfeløgini fara at koma til eina felags niðurstøðu um tey yvirhøvur fara at góðtaka lønarsteðg.

Kortini vísir hann á, at ger løgtingið tað við lóg, er onki, sum kann forða tí.

- Og tað hevur Løgtingið gjørt fyrr í kreppuni í nítiárunum, so vit fara fordømi, leggur hann afturat.

Í øllum førum heldur hann, at tað er sera óheppið at ein slík fráboðan kemur frá einum topp politikara í samgonguni, áðrenn málið yvirhøvur er umrøtt við fakfeløgini.

Hann væntar eisini, at fakfeløgini fara at venda sær til landsstýrið við málinum.

- Tað er fíggjarmálaráðið, sum er okkara beinleiðis samráðingar mótpartur so tað verður fyrst og fremst Jóannes Eidesgaard, sum skal svara fyri tað, sum Anfinn Kallsberg hevur boðað frá.

Hann sigur, at fakfeløgini eru sjálvandi ikki samd í tí, at lønirnar skulu lækka.

Hinvegin eru fakfeløgini mest áhuga í at keypiorkan ikki fer at lækka og í hesum sambandi hava onkrir fundir verið við fíggjarmálaráðið.

Onkrir fundir hava verið um tað, at keypiorkan er minkað og um, hvussu inntøkur kunnu útvegast til landskassan.

Kortini staðfestir hann, at talan er ikki um at hækka skattir ella avgjøld, men enn er ongin niðurstøða av tí samskiftinum.

Aðrir møguleikar hava verið nevndir bóltar, sum eru tveittir í luftina, uttan nøkur avgerð er tikin, er at strika sjómannafrádráttin, avmarka rentustuðulin, avmarka tollfría sølu, at áleggja tilfeingisgjald og ognarskatt.

# Hans Joensen fer at krevja heilt aðrar bollar í súpanina

**Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag fer undir ongum umstøðum at góðtaka kravið frá Anfinni Kallsberg í Sosialinum í gjár um at ongar lønir skulu hækka næstu árini**

LØNARSTEÐGUR
*Áki Bertholdsen*
*Sosialurin.fo*

- Hatta kann Anfinn Kallsberg ikki vera bekentur!

Hans Joensen, formaður í HavnarArbeiðsmannafelag, er ikki sørt argur inn á tað, sum Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini, førdi fram í Sosialinum í gjár, um at eftir hansara tykki er tað einasta rætta at steðga øllum lønarhækkingum tey næstu árini, bæði á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum fyri at fáa búskapin aftur á beint.

- Vit skulu til lønarsamráðingar aftur um eitt ár og sjálvandi fara vit at krevja lønarhækking, staðfestir formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hann heldur, at Anfinn Kallsberg skuldi skamma seg, at koma við eini útsøgn sum hesari.

- Eg skilji ikki, hvussu Anfinn Kallsberg kann hugsa um at nokta okkum lønarhækking, eftir at allir prísir eru farnir upp í loft hesi seinastu árini.

- Síðani vit gjørdu sáttmálan fyri tveimum árum síðani, er prísirnir hækkaðir so nógv, at keypiorkan er minkað og sostatt er í veruleikanum talan um eina lønarlækking, staðfestir hann.

### Mugu taka avleiðingarnar

Hann heldur, at tað er ein spurningur, hvussu leingi borgarin fer at finna seg í slíkari framferð og taka politikkararnir nú rættin frá fakfeløgunum at samráðast um lønarhækkingar, mugu teir eisini vera til reiðar at taka avleiðingarnar av tí.

Hvørjar tær avleiðingarnar vera, vil hann ikki siga nakað um enn.

Kortini ivast hann ikki í, at vandin fyri álvarsligum avleiðingum er avgjørt til staðar, tí fólk eru rættiliga kroyst.

Men hann staðfestir, at skal talan verða um lønarsteðg, skulu heilt aðrir bollar í súpanina.

- So verður treytin tann, at landsstýrið kemur við í samráðingarnar ímillum fakfeløgini og arbeiðsgevaran fyri at tryggja okkum, at ongi avgjøld verða løgd á borgaran og at onnur avgjøld koma at lækka so at keypiorkan kann veksa.

- Tað ber ikki til at krevja lønarsteðg so leingi allir prísir fara upp, leggur Hans Joensen afturat.



*Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, heldur, at Anfinn Kallsberg kann ikki vera bekentur at krevja at lønirnar ikki skulu hækka og næstu ferð, samráðingar verða, fer Havnar Arbeiðsmannafelag sjálvandi at krevja lønarhækkingar*